# Johan Müller fer frá



*Hanneman takkar fyri seg sum lærari, eftir 38 ára tænastu*

**Týsdagin var hátíðardámur í Vágs Skúla , tí ein teirra, ið hevur verið longst í starvi, hevur gjørt av at fara frá sum lærari við skúlan**

STØRV

Johan Dahl Müller, millum manna nevndur Hanneman, er farin frá sum lærari við Vágs Skúla. Hann er millum teirra, ið hevur verið longst í starvi í Vágs Skúla.

Hanneman er fótbóltssnillingur og var í seksti og sjeyti árunum kendur kring Føroya land sum ein hin fremsti innan føroyskan fóbólt. Sonurin, Jan Allan, hevur eisini runnið í fótasporum faðirsins, og var millim teirra, ið fyrstur gjørdi sáttmálar í útheiminum,

Johan Muller er føddur í Vági tann 19. januar í 1946 og er sonur Johannes Dahl Muller úr Vági og og Borghild f. Christiansen úr Havn. Hann er giftur Connie f. Jacobsen úr Vági.

Johan tók læraraprógv á Nr. Semenarium í 1968 og hevur verið lærari í Vágs Skúla síðani.

**do**

**Prógv**

8. august fekk Maria Danielsen prógv sum cand. oecon (búskaparfrøði) á Aarhus Universitet.

28. august hevur Anne Maria Vinther, úr Vági, loki› útbúgving sum lækni á Odense Universitet.

**Brúdleyp**

Leygardagin 2. september kl. 16.00 giftast í Christianskirkjuni Kristina í Króki, Strendur og Karl Jakob Ósá Eliasen, Klaksvík. Veitslan verður fyri innbodnum kl. 19.00 í Bygdarhúsinum í Leirvík.

Leygardagin 2. september kl. 15.00 giftast í Filadelfia, Havn, Rakul Jacobsen og Regin við Skipá. Reseptión verður eftir vígsluna. Veitslan verður á Hotel Føroyum kl. 19.00 fyri innbodnum.

Leygardagin 2. september giftast í Lyngby kirkju Anette Højgaard Godtlieb (dóttur til Sólbjørg Højgaard, Saltangará og Niels Erik Godtlieb) og Kenneth Ørgaard, Lyngby. Brúdleypsadr.: Toftegærdet 16, 2800 Kgs. Lyngby.

Leygardagin 2. september giftast í prestagarðinum í Lamba Rógvi Zakariasen og Hanna Olsen, Runavík. Veitslan verður í Bygdarhúsinum í Hósvík kl. 19.00.

**70 ára føðingardagur**

Mánadagin 4. september verður Julius Olsen á Toftum 70 ár. Dagurin verður hildin á Svangaskarði mánakvøldið kl. 19.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**40 ára starvsdagur**

1. september hevði Jógvan Kruse, innkeypsleiðari, starvast hjá P/F Poul Hansen í 40 ár.

# Seniorskeið á Føroya Fólkaháskúla




*Skeiðluttakarar og lærarar. Aftara rað f.v.: Sverri Patursson, Bjørfinnur Nielsen lærari, Kristian Petersen og Magnus Joensen. Fremra rað f.v.: Elin Lindenskov lærari, Lena Johannesen, Signý Poulsen, Guðrið Poulsen lærari, Steintóra Johannesen, Anna Andreasen, Johanna Bill-Jessen, Pálma Joensen, Elsa Patursson, Anna Petersen og Helga Strøm. Sjúrður Hansen og Fanny Mouritsen vanta á myndini*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Føroya Fólkaháskúli skipaði í døgunum 21. – 30. august 2006 fyri skeiði fyri yngri pensionistar. Talan er um sonevnd seniorskeið, sum serliga eru ætlað yngri pensionistum.**

å14 fólk luttóku á hesum skeiðnum, sum vardi í 10 dagar.

Endamálið við hesum skeiðnum var at fáa seniorarnar burtur úr vanliga gerandisdegnum og royna nakað heilt annað.

Hetta var eitt vanligt háskúlaskeið, har skipað varð fyri fyrilestrum, útferðum og vitjanum á søvnum. Tey hava gingið úti í náttúruni og hava t.d. gjørt prýðislutir burturúr ymiskum lutum, sum tey hava funnið í fjøruni.

Frá Háskúlanum verður sagt, at gott samanhald og rættur háskúlaandi var millum tey luttakandi, sum veruliga hava hugnað sær og upplivað nógv spennandi og søguríkt hesar dagar. Eftir ætlan verður hetta eitt afturvendandi tiltak.

# Framsýning við »Fragmented Unison« í Snarskivuni



Framsýning við fotomyndarøðini ”Fragmented Unison” hjá Mariannu Mørkøre og Mariu Arnell letur upp í Snarskivuni hósdagin, 31. august, kl.16 og verður at síggja fram til 29.september.

»Fragmented Unison« er ein svørt-hvít myndarøð við 9 myndum, har tann klassiska føroyska náttúrumyndin er sett saman við fimm einsháttaðum gentum. Hetta setur ein surrealistiskan dám á myndarøðina. Myndirnar avmynda tann byrjandi ungdómin í eini óspiltari náttúru við íblástri úr sterkum grafiskum kompositiónum.

Í næstum verða myndirnar at síggja á Clarion Hotel í Stockholm í samband við altjóða fotofestivalin xpo-September 23.9 - 22.10. At vera við í einum tílíkum fotofestivali er eitt sera gott høvi at vísa fram myndarøðina og sostatt fáa samband við onnur altjóða framsýningarstøð.